# Hergerð málar so hugnaligt

**Hon hevur áður luttikið við málningum sínum á framsýningum saman við øðrum. Nú er Hergerð Joensen í Havn á fyrsta sinni við myndum sínum í Smiðjuni í Lítluvík**

MÁLNINGALIST
*Snorri Brend*

**Havn:** Longu sum ung keypti Hergerð Joensen sín fyrsta málning. Og henni hevur altíð dámað væl at gingið til listaframsýningar. Onkutíð kom kanska eisini hugsanin fram, um tað var nakað fyri hana at taka pensil í hond og skapa síni egnu listarverk.

Nú var tíðin so búgvin til at Hergerð kundi vísa øðrum nakað av tí, hon sjálv hevur skapað sum listarkvinna av størri og smærri listarverkum úr akryl og vatnlitum.

Og hesar komandi dagarnar hevur hon tískil listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík við væl omanfyri 30 verkum. Framsýningin letur upp í dag kl. 16 og er opin til týsdagin.

## Hugnaligar myndir

Hergerð vil ikki gera so nógv burtur úr myndum sínum. Men líkt er kortini til, at fólki dámar tað hon málar.

Í Blóðbankanum á Landssjúkrahúsinum, har hon starvast, høvdu tey ofta hangandi ymiskar plakatir sum høvdu við hetta arbeiðið at gera.

Hon spurdi seg einaferð lso fyri, og fekk loyvi til at hanga nakrar av hennara egnu myndum upp ístaðin í hølinum, har blóðgevarar lata blóð.

- Og tað var ikki frítt at blóðgevarar dámdu myndir mínar. Tey søgdu, at tær vóru so hugnaligar.

- Hetta var eisini við til at geva mær áræði til at halda áfram at mála, sigur Hergerð Joensen.

Hon hevur seinastu 10 árini verið á fleiri listaskeiðum í Danmark, m.a. í Holbæk, og var í summar eisini á skeiði sum varð fyriskipað við Gjógv.

Nú fær so almenningurin høvið til at síggja smærri og størri listarverk, sum henda 62 ára gamla, men kortini fríska kvinnan hevur latið úr hondum.



*Tveir av litríku málningunum hjá Hergerð Joensen – vm. Summar og hm. Bláa myndin – sum fólk hava høvið at síggja teir komandi dagarnar*

*Mynd: Jens Kr. Vang*




# Reinar vágir í 2010

**Havn:** Arbeiðið at fáa vágirnar í Havn reinar heldur fram. Higartil er m.a. løgd ein nýggj høvuðskloakk úr Havnará vestur í Dalavegin, og nú verður hildið fram eftir J. Paturssonargøtu út á Frælsið.

Tórshavnar Kommuna sigur, at hetta verður gjørt fyri at leiða allar kloakkirnar í eina høvuðskloakk, heldur enn oman í vágirnar. Næstu stigini verða at gera kloakk framvið Skálatrøð og at reinsa alla Rættará.

Høvuðskloakkin, sum gjøgnum reinsiverk rennur út í Sersjantavíkina, verður nú leidd longur út á streymasjógv.

Frá teimum stóru útstykkingunum í Hoyvíkshaganum verða allar kloakkirnar veittar út á sjógv. Virkað verður samstundis fyri, at alt dálkandi yvirflatuvatn verður reinsað og latið aftur í áir og løkir.

Men útjaðarin í kommununi skal somuleiðis hava somu sømdir, og tí hevur býráðið sett sær fyri at gera arbeiðir her eisini. Í Hesti verður tí farið undir stórt kloakkarbeiði í næstum, upplýsir kommunan. **sb.**

# Hovstunnilin fer nú í gongd

**Landsverk og íslendska felagið Ístak hava nú skrivað undir ein sáttamála um at gera Hovstunnilin, sum er tunnilin millum Hov og Øravík. Arbeiðið fer í gongd beinanvegin og verður liðug um hálvttriðja ár**

SAMFERÐSLA

**Suðuroy:** Ætlaninar við Hovstunnlinum hava verið ávegis í fleiri ár og eru eisini broyttar nakrar ferðir, áðrenn endaligu linjuføringina, sum nú er løgd.

Seinastu vikurnar hava Landsverk og SEV gjørt klárt Øravíkarmegin til at arbeiðið uppá Hovstunnilin skuldi kunna fara ígongd.

Nú er so sáttmálin undirskrivaður, og er nú greitt, at Hovstunnilin verður liðugur í desember mánað 2007. Væntandi verður skotið ígjøgnum í november mánaði næsta ár.

Kostnaðurin fyri samlaðu verkætlanina er umleið 150 mió. kr., av hesum fevnir sáttmálin við Ístak um 126,7 mió. kr. Restin fevnir um ymisk arbeiði, sum Landsverk skal standa fyri, skrivar Suðurrás.

Longdin á nýggja tunlinum verur 2,450 kilometrar. **sb.**